## Spurningar til s. 46 til 50 Lívið er eitt spæl

1. Í fyrstuni av partinum verður sagt: “Og so kom várið”. Hvussu sæst várið aftur?
2. Hvaðar er Eyði á veg?
3. Hvør kemur smárennandi aftan á honum?
4. Hvat verður Eyði spurdur um?
5. Hvat er hansara svar?
6. Hvat meinar Eyði, tá hann sigur: “Tíverri eri eg ikki so hálur at halda um, sum ávís onnur”?(niðast s. 46)
7. Hví hvøkkur Eyði við, tá hann tosar við Lisu?
8. Hvat merkir: “Í somu løtu køvdi av hjá mær”? (ovarlaga s. 48)
9. Hvør kemur og órógvar samtaluna?
10. Hví er Áki ikki heilt nøgdur?
11. Hvussu fara Lisa og Eyði í skúla?
12. Hvør er størsti trupulleikin hjá Eyða, tá hann hugsar um leygarkvøldið?
13. Hvussu verður tann trupulleikin loystur?
14. Hvat sigur Eyði, at hann skal hetta leygarkvøldið?
15. Hvussu er samrøðan millum mammuna, pápan og Eyða?

## Spurningar til s. 51 – 56 reglu 2 í Lívið er eitt spæl

1. Hvussu eitur pápi Eyða?
2. Hvussu hevur Eyði fyrireikað seg til hetta kvøldið?
3. Hvussu er huglagið heima við hús hetta kvøldið, áðrenn mamman og pápin fara út?
4. Hvussu hevur Eyði tað, meðan hann bíðar eftir Lisu?
5. Hvat hendir?
6. Hvussu finnur Eyði út av, hvar hon er farin?
7. Hvar er hon farin?
8. Hvussu tekur Eyði tað, at hann er svikin?
9. Hvat ger hann?
10. Hvat hugsar hann, áðrenn hann fer avstað?
11. Hvussu gongur at koyra?